# VINNUSÍÐUR

SAMBAND
Jan Müller
jan@sosialurin.fo
TLF 341800

# Útflyta barnasendingar

**Íslendska barnasendingin Lazy Town hevur veruliga fótað sær á altjóða marknaðinum. Hon verður nú víst á stórum sjónvarpsrásum ymsastaðni í heiminum. Spurningurin er, um tær føroysku barnasendingarnar eisini kunnu vera ein møgulig útflutningsvøra**

ÚTFLUTNINGUR
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Leingi hevur í Føroyum verið tosað um, at finna alternativa útflutningsvøru. Mest sum allir samfelagsfrøðingar og búskaparfrøðingar eru samdir um, at útflutningsvøran í tí altjóðagjørda heiminum í størri mun verður vitanar- og undir-haldsvøra.

Í Føroyum er ein sera stórur partur av útflutningi okkara óvirkað rávøra, og tað er ikki heilt í trá við ímyndina av einum framkomnum og altjóðagjørdum samfelag.

Ísland hevur havt eydnu við at umleggja teirra búskap og eru slóðbrótarar innan nógv øki við teirra vitan og mentanarliga førningi.

Føroyingar tosa eisini nógv um hetta, og vit hava leingi vónað, at tónleikurin kann gerast ein nýggj útflutningsvøra. Hóast summir tónleikarar hava klárað seg væl uttanlands, so vantar enn tað stóra gjøgnumbrotið.

Ein íslendsk barnasending kallað “Lazy Town” hevur veruliga sligið ígjøgnum á altjóða marknaðinum. Sendingin er bygd á nøkur “show”, har ið skemt og sjónleikur verður nýtt til at fremja ein sunnan livihátt. Endamálið við sendingini er at fáa børn at liva eitt sunt lív við sunnum mati og nógvari rørslu.

Sendingin er vorðin sera væl umtókt av børnum orsakað av undirhaldsvirðinum og skemtiliga stílinum. Hon er eisini sera væl umtókt av foreldrunum orsakað av sunna boðskapinum og sterka moralinum.

## Trúði uppá hugskotið

Tað er íslendingurin Magnus Scheving, sum hevur skapað konseptið Lazy Town. Hann er rithøvundur, fimleikari, entreprenørur og undirhaldari. Hann gjørdist evropeiskur meistari í fimleiki í 1994 og 1995. Í Íslandi er hann væl dámdur sum fyrilestrarhaldari, og hansara bakgrund sum ítróttamaður sæst aftur í hansara fyrilestrum.

Magnus vil fegin hjálpa foreldrum og børnum teirra, so at børnini kunnu fáa ein sunnan uppvøkstur við nógvari rørslu, ábyrgdarfullari umsiting av pengum og sterkum etikki. Í 1991 skrivaði hann bókina “Go, Go Lazy Town” og nú nógv ár seinni hevur hugskotið ment seg, og Lazy Town er eisini at síggja í sjónvarpinum.

Tað, sum er áhugavert við hesum, er, at ein maður fekk eitt hugskot, og hann trúði veruliga uppá tað. Sendingarnar gjørdust væl umtóktar í Íslandi og nú hava tær fingið sítt veruliga gjøgnumbrot. Tó kom tað stóra gjøgnumbrotið langt eftir, at hann av fyrstan tíð byrjaði við sendingunum.

## Barnasendingar møgulig útflutningsvøra

Í Føroyum hava vit nakrar barnasendingar, sum eru væl umtóktar. Spurningurin er, um vit skuldu lagt størri orku í at marknaðarføra tær barnasendingar, sum verða gjørdar.

Tað er eingin loyna, at Angela og Hannibal, Likkulikkuleia og Trøllapætur er eitt tað besta føroyska sjónnvarpstilfarið, sum er framleitt yvirhøvur. Kanska hetta tilfarið kann roynast væl á altjóða marknaðinum.

Tey føroysku konseptini minna um konseptið hjá Lazy Town, og hóast tað er langt síðani, at sendingarnar komu fram í Føroyum, so kunnu tær enn vera áhugaverdar í øðrum londum. Fyrimunurin í Føroyum er, at tann føroyska vøran er fyrst roynd á ein minni marknaði (les: tí føroyska),og kann hon tí vera væl brýnd til at fara út á tann altjóða marknaðin.

# Trøllapætur nærkast altjóða gjøgnumbroti

**Niklas Heri Jákupsson er maðurin aftanfyri Trøllapætur og Kular Røtur. Hann sær ein stóran møguleika í at útflyta vøruna hjá sær**

ÚTFLUTNINGUR
*Heini S Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Trølla Pætur er veruliga við at fóta sær á íslendska marknaðinum. Væntandi verður filmurin skjótt vístur í íslendska sjónvarpinum. Eisini er ein avtala við eitt stórt DVD-felag um at koma undir land.

Niclas Heri Jákupsson stendur fyri konseptinum við Trølla Pæturi. Tá ið hann verður spurdur, um føroyingar kunnu útflyta barnasendingar og filmar, er hann avgjørdur:

- Hetta er veruliga tað, sum vit satsa uppá, og tað eigur at bera til. Vit hava allatíðina havt vísjónir um at koma útum landoddarnar við okkara vøru, men tað eru nógvar forðingar. Men nú sær sera gott út, sigur Niklas Heri.

- Tá ið vit byrjaðu, vóru vit púra grønir á økinum, og tí vóru tveir teir fyrstu filmarnir kanska ikki so góðir. Men børnunum dámdu teir væl kortini, og tað sigur mær, at konseptið er gott. Figurarnir hava ein ávísan fólkatokka, og tað er ein stórur fyrimunur, sigur hann.

## Íslendingar taka Trølla Pætur til sín

Í Íslandi hevur leingi verið áhugi fyri konseptinum. Síðsti filmurin „Trølla Pætur og Mafian“ er umsetur til íslendskt, danskt, norskt og enskt. Tað er ein frásøgumaður, sum fortelur, hvat hendir. Men íslendingar eru ikki heilt nøgdir við tað, og teir eru tí í holt við at fáa synkroniseraða talu í filmin. Málið er so at fáa filmin í íslendskt sjónvarp. Teir hava eisini umsett teir bestu sangirnar hjá Kulum Røtum og Trølla Pæturi til íslendskt og givið teir út á fløgu og til jóla kemur ein nýggj fløga út við Trølla Pæturi á íslendskum.

- Vit eru sera spentir uppá samstarvið við íslendingar. Vit vænta, at teir eisini kunnu hjálpa okkum at fáa konseptið út í onnur lond. Teir duga væl at geva teirra vøru ein altjóða dám, og vónandi kunnu teir hjálpa okkum eisini, sigur Niklas Heri.

- Íslendingar hava fingið búnar hjá Trølla Pætur og Trølla Ommuni, og hava vit verið í Íslandi og upplært sjónleikararnar.

- Vit hava einki ímóti, at teir skulu fáa ein part av rættindunum til konseptið, um teir kunnu marknaðarføra tað væl betur enn vit duga. Vit vilja heldur eiga ein lítlan part av nógvum enn at eiga nógv av lítlum, sigur hann.

## Samráðast við stórt DVD-felag

Fólkini aftanfyri Trøllapætur eru beint nú í samráðingum við Elap, sum er størsta DVD-felag í Skandinavia. Hetta kann eisini vera við til at gera Trølla Pætur kendan í okkara grannalondum.

- Avtalan hevur við sær, at ELAP fær tær fyrstu fimm túsund DVD-fløgurnar ókeypis. Vit geva teimum fløgunar fyri at fáa betri marknaðarføring. Beint nú ræður bara um, at so nógv sum gjørligt síggja filmarnar og koma at kenna Trølla Pætur.

## Eigur at bera til

Niclas Heri heldur, at tað eigur at bera til at útflyta tílíka vøru.

- Rithøvundarnir og manuskripthøvundarnir í Føroyum eru eins góðir og alla aðrastaðni. Um karmarnir høvdu verið til staðar, so hevði eingin trupulleiki verið. Tað verður nógv tosað um, at ov stórur partur av okkara útflutningi er fiskur, men eingin torir veruliga at royna nakað øðrvísi.

- Mær dámar ikki at brúka orðið stuðul, men í einari vinnu, sum er nýggj og sum kann kasta nógv av sær, kundi kanska verið eitt slag av stuðli. At gera film kostar sera nógv, og tað er tungt um somu fólk, sum skriva og spæla, eisini skulu út at skaffa stuðul frá vinnuni og handilslívinum.

- Vit satsa nú alt uppá Trølla Pætur og Mafiuna. Vit hava handa hesa verkætlan til íslendingar, og vóna vit nú, at teir kunnu verða við til at fáa tað stóra gjøgnumbrotið uttanlands, sigur Niklas Heri Jákupsson.